







# Føroyar mítt land

Á Rás 2 sunnudagin 24. august kl. 13

Tað eru tær fimm sendingarnar, sum vóru nú í vikuni, sum verða endursendar á Rás 2 sunnudagin kl. 13. Í teirri fyrstu varð røtt um ein á mangan hátt sjáldsaman mann, sum búsettist úti í óbygdum inni við Skálafjørðin miðskeiðis í 19. øld. Síðani varð hugleitt um læknaviðurskifti í Norðoyggjum fyri væl fimmti árum síðani, blaðað varð í føroyskum ávísum frá fyrru helvt av farnu øld, greitt varð frá um deksbátar, sum bygdir vóru í Havn, Vestmanna, Klaksvík og á Skála tíðliga í farnu øld, og vikan endaði við áhugaverdari frásøgn um Sandoyarprestin Kálv Lítla, sum livdi í 14. øld.

Alt hetta søguliga tilfarið verður høvið til at hoyra aftur á Rás 2 sunnudagin kl. 13.

**Føroyar mítt land í næstu viku:**
25/8 Hanus A. Samuelsen
26/8 Janus Mohr
27/8 Regin Debess
28/8 Kristianna Rein
29/8 Eirikur Lindenskov

Hvønn gerandisdag kl.8, kl.9, kl.22 og kl.23, (týsdag tó 22.30)